# Viðmerking til upprit frá Biritu Ludvíksdóttir um lóg um Manntal 2011.

**Viðvíkjandi spurningunum um “Almenna heilsustøðu, avmarking í dagligum virki orsakað av sjúku ella breki.”**

Her er talan um tveir spurningar, sum eru soljóðandi:

Spurningur E12

Hvussu er heilsan hjá tær í mun til tín aldur?

| Sera góð | Góð | Hampulig | Ring | Sera ring |
|---|---|---|---|---|
| ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

Spurningur E13

Er títt dagliga virki avmarkað orsakað av einum heilsutrupulleika ella breki, sum hevur varað ella væntandi fer at vara í minsta lagi 12 mánaðir?

ⓘ Heruppií trupulleikar av høgum aldri

- ☐ Ja, nógv avmarkað
- ☐ Ja, eitt sindur avmarkað
- ☐ Nei

Hesir spurningar verða eftir ST-vegleiðingini ikki hildnir at vera viðkvæmir spurningar.

Eisini onnur lond hava hesar spurningar við í teirra spurnabløðum.

Orsøkin til, at hesir spurningar ikki vera hildnir at vera viðkvæmir og brot á ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, ið bera brek, er, at her er talan um sonevnda ”sjálvsuppfatan” av egnari heilsu. Talan er ikki um diagonosur ella um, hvørja sjúku ella hvørji brek svararin hevur. Úrslitið verður ein hagfrøðilig mynd av, hvussu føroyingar fata sína egnu heilsu og møguligar avmarkingar í dagligum virki.

Ein fortreyt fyri øllum manntalinum er, at ongar upplýsingar verða lætnar almennum mynduleikum ella øðrum. Hagstova Føroya eigur upplýsingarnar og letur tær bert víðari, sum hagtøl.

Felags fyri allari nýtslu av upplýsingar, sum koma fram í svaraðu spurnabløðunum er, at eingin persónur, einki húski ella býlið má kennast aftur. Upplýsingarnar verða bara almannakunngjørdar sum hagtøl, har eingin kann kennast aftur.

Tá hesar upplýsingar um ”Almenna heilsustøðu, avmarking í dagligum virki orsakað av sjúku ella breiki” eru sjálvsuppfata støðan, verður ikki hildið, at upplýsingarnar um 80 ár fara at ganga nøkrum ov nær.

Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum (MBF) hevur havt spurning E13 til umrøðu og hevur onga viðmerking til spurningin. Tvørturímóti var áhugi fyri fleiri spurningum um brek og sjúkur. Men Manntal helt, at fleiri spurningar kundu fatast sum viðkvæmir.

Eisini Dátueftirlitið hevur góðkent allar spurningar í spurnablaðnum.

**Viðvíkjandi lógargreinini um " Avvarðandi, verji ella onnur svara fyri tey, sum ikki sjálvi eru før fyri at svara spurningunum."**
Henda lógargreinin er meiri ein staðfesting av, at øll ikki eru før fyri at svara ella kunnu svara. Tað kunnu vera børn, sjúk, burturstødd ella fólk, sum av aðrari orsøk ikki kunnu svara.

**Viðvíkjandi lógargreinini um "løggildar teljarar"**
Manntal tekur undir við at broyta "løggildar teljarar" til góðkendar teljarar.

**Viðvíkjandi lógargreinini um hugtakinum "koma á gátt"**
Her hevur ongantíð verið ætlanin, at ganga móti § 72 í grundlógini, sum sigur, at bústaðurin er friðhalgaður ella art. 8 í europeiska mannarættindasáttmálanum, sum sigur, at ein og hvør rætt til respekt fyri sínum privatlívi og sínum heimi.

Júst fyri at lýsa hetta eru hesi brot sett í viðmerkingarnar til lógina. Fyrst undir "Avleiðingar av lógaruppskotinum." og í viðmerking til grein 4, sum umrøður tað "at koma á gátt".

"*10. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn skal grundgevast fyri hesum og greiðast frávavinum av heimildini.*
Í lógini verður heimilað teljarunum at koma "á gátt" hjá fólki. Tað at teljari kann koma á gátt merkir, at hann kann koma til dyrnar, banka uppá og siga ørindi síni, sum er at heinta spurnarblað og kanna, at spurningarnir eru svaraðir. Teljarin hevur tó ongan rætt at tvinga seg inn í heimið hjá fólki ímóti teirra vilja. Um fólk ikki sjálvi bjóða teljaranum innum, avgreiðir teljarin ørindi síni í hurðini, durinum ella gongini."

Úr viðmerkingunum til grein 4 í lógaruppskotinum:
"Teljararnir skulu umframt at vera myndugir eisini vera egnaðir til arbeiðið. Hetta merkir eitt nú, at tey, sum verða sett í starv, skulu vera álítandi, skilja týdningin av trúnaði, skilja markið millum at koma á gátt og rættin hjá einstaklinginum í egnum bústaði."

**Viðvíkjandi lógargreinini um at tann, sum ikki svarar spurningunum sambært § 3, stk. 3 við vilja ella av grovum ósketni, verða revsaður við bót.**
Grundarlagið hjá Landsstýrinum at biðja um eina fólkateljing var at útvega føroyska samfelagnum upplýsingar, sum eru neyðugir fyri at menna samfelagið á ymsum økjum. Skal ein fólkateljing tæna hesum endamáli, er umráðandi at øll svara.
Sæð tí tí ljósinum er hendan viðmerkingin í lógaruppskotinum:

"*8. Áleggur uppskotið fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum.*
Tað verður álagt fólki skyldu at svara manntalsspurningunum. Tá farið verður undir at hava eitt manntal, er grundin, at samfelagið ynskir at fáa neyvari lýsing av, hvussu Føroyar síggja út í ár 2011. Hetta er eitt átak, sum kostar samfelagnum fleiri mió. kr., og tí ynskir man at fáa svar frá øllum borgarum í Føroyum. Av royndum veit man, at tað ikki letur seg gera at fáa øll at svara, um tað verður sjálvboðið fyri borgarar at svara. Tí er tað mett neyðugt at áleggja fólki at svara spurningunum. Hendan skyldan fyri borgaran verður mett at vera eitt minni inntriv sæð í mun til nyttuna, sum samfelagið fær av úrslitinum av manntalinum."